


KT2006 er skipað í tveimum pørtum. Ein partur er framsýningin, har fyritøkurnar vísa hvat tær eru allarbest til. Hin parturin er ein ráðstevnupartur, har høvi er at hoyra fleiri spennandi fyrilestrar.

Málbólkurin til KT2006 eru stjórar, leiðarar, KT-innkeyparar og annars fólk við áhuga í KT ella spennandi fyrilestrunum, sum eru á skránni.

FRAMSÝNARAR Á STEVNUNI:

| | | | |
|---|---|---|---|
| KT-Kleking | www.trade.fo | FO-ráðið | www.nic.fo |
| iConcept | www.iconcept.fo | ISUUS MOBILE | www.isuus.com |
| Com-Data | www.com-data.fo | Føroya Tele | www.tele.fo |
| Sansir | www.sansir.fo | Formula | www.formula.fo |
| Kall | www.kall.fo | Reproz | www.reproz.fo |
| Farodane | www.farodane.fo | Bitland | www.bitland.fo |
| Zenit | www.zenit.fo | LM-Electric | www.lm.fo |
| Elektron | www.elektron.fo | 3D myndil | www.3d.fo |
| Jónsvein Joensen | | Winit | www.winit.fo |
| Simprentis | www.simprentis.fo | Føroya Sporførisskipan | |

TEAM 8 5 1 © Image provided by: Dreamstime.com



ARBEIÐIR TÚ,
FYRI AT TEKKJAST ØÐRUM?
v/Tor Nørretranders

Kendi danski rithøvundurin, Tor Nørretranders er kendur fyri at kunna greiða frá fløktum vísindaligum teorium, soleiðis at vit øll skilja tað. Ein fyrilestur fyri øll.



DIGITALA HEIMIÐ
– tað ultimativa elektroniska arbeiðsplássi
v/ Birger Hauge, Dansk Bredbånd

Fyrilesturin vísir uppá ein visioneran hátt á møguleikarnar hjá fyritøkum, sum selja ella menna vørur til "Digitala heimið".



KREATIV LEIÐSLA
v/ Peter Langdal Jensen

Jú stuttligari tað er at koma til arbeiðis, jú meiri produktivitetur, innovatión og rentabilitetur og harafturat betri arbeiðsklima. Hevur tú ábyrgd fyri starvsfólki, er hesin fyrilestur eitt MUST!



GLOYM HEIMAMARKNAÐIN!
v/ Heina Zachariassen

Heini gevur sítt boð uppá, hvussu hann heldur, at KT-vinnan í Føroyum kann koma út í heim.

SERLIGT UNGDÓMSTILTAK FYRI MIÐNÁMSSKÚLANÆMINGUM!
Ungdómstiltakið er opið fyri øllum miðnámsskúlanæmingum eftir avtalu við skúlan og KT2006.

Skúlar kunnu venda sær til Synergi - synergi@synergi.fo - við upplýsingum um, hvussu nógvir næmingar koma frá hvørjum skúla. Avmarkað pláss!



EIN KT-FRØÐINGUR ER IKKI EIN GANDAKALLUR!
v/ Silviu Lauritsen, KompeTansa

Hvussu síggja fólk KT-frøðina í dag, og hvussu fer okkara nýggja ættarlið at síggja hesa frøði?



FRÁ LOKNUM MIÐNÁMSSKÚLA TIL
STJÓRA Í BULLGUARD
v/ Heina Zachariassen

Hvussu bleiv Heini egentliga stjóri í BullGuard?

ATLANTIC AIRWAYS
- stuðul á KT2006

KT2006

Tilmelding og meira um tiltakið á www.kt.fo

Synergi samskipar KT2006 fyri KT-felagið
tel 22 RING (22 74 64) · synergi@synergi.fo


# Nýggj øl frá Føroya Bjór fær góð ummæli

**Nýggja ølin hjá Føroya Bjór, Rockall, fær góð ummæli í Danmark**

ØL
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Føroya Bjór hevur framleitt eina nýggja øl, ið hevur verið á marknaðinum eina tíð. Talan er um sonevnda Brown ale, og í Danmark fegnast ummælarar.

Erik Lüthje Frandsen sigur m.a. soleiðis í drúgvum ummæli:

Igen – har de gæve færinger gjort det – de har gjort noget godt for øltraditionerne som alverdens ølelskere kan være pokkers stolte over. Og igen er jeg blevet bedt om at smagsteste – bedømme helt subjektivt hvad denne milde ale med det bløde fjeldvand kan gøre ved ølganen… Ydmyg og med megen stolthed er jeg gået i gang med at smagsbedømme denne liflige drik.

Og jo – subjektivt må det blive; men det kan simpelthen ikke diskuteres, at det er særdeles godt øl der produceres i det traditionsrige bryggeri i Klaksvík.

Alen er brygget efter gamle engelske traditioner, mikset med råvarerne lys malt, caramel malt og chocholate malt. Desuden er der anvendt en engelsk humle med navnet East Kent Golding. Også gæren er en engelsk special ale gær.

Den nøgterne bedømmelse af øllet kan udtrykkes som en øl med et moderat taktilt indtryk. Der er en tydelig frigivelse af kulsyre når øllet når munden. Dette indtryk af kulsyre overgåes straks efter af en dejlig let kompleks smag med mange elementer. Straks kulsyren er frigivet kan øllet virke en snert dovent, men det er absolut kun en følelse. Det at kulsyren ikke overdrives bevirker blot at alle smagsnuancer kommet til. Den store kompleksitet med de forskellige malt sorter gør øllet helt unikt – en ganske ubeskrivelig frugtagtig smag der hænger længe i munden. Også humlen har en meget stabil smag der varer meget længe. Dejligt at smagen ikke blot fordufter straks du har drukket det, men derimod så forbliver eftersmagen temmelig længe i munden

Hvad færingerne gør med den store øl succes kan man kun gætte på – sætter færingen selv pris på det gode øl? Hvad gør bryggeriet når øllet bliver en succes – kan de følge med? Jeg ved det ikke, men når bryggeriet kan finde på at udfolde sine kreative bryggerevner på så dejlig en måde, så må jeg indrømme, at jeg glæder mig temmelig meget til den næste øl de finder på der oppe på de stormomsuste klipper. Og jeg skal straks stille mig til rådighed som smagstester igen… Jeg kan ikke skjule min trang til at besøge dette fantastiske bryggeri – det skal jeg bare, jeg vil inden alt for længe give mig selv den oplevelse at opleve golfstrømmens vinde slå om Færøernes klipper, jeg vil opleve det gæve bryggeri med de stolte traditioner, sigur fegni ummælarin millum annað.







# Poppkorn vitjar í Suðuroynni

**Leygardagin 22. apríl verður konsert í Royn-høllini við Poppkorn**

Leygardagin 22. apríl kl. 14:30 verður stór konsert í Royn-høllini við føroyska gentubólkinum Poppkorn, veit heimasíðan hjá Suðurrás at siga.

Landaplágur sum eitt nú "Sjeikurin" og "Droymi mitt um dagin" verða m.a. at hoyra. Bussar koyra í samband við tiltakið bæði úr Vági.

Meiri kann frættast um bólkin á www.poppkorn.net

Eftir konsertina verður dansur við vælumtókta suðuroyarbólkinum Pikatchu. Bussar koyra eftir dansin.

# Væleydnað konsert við Eivør og Bill í Vancouver

**Konsertin fríggjakvøldið, í gjár, eydnaðist væl og fleiri føroyingar komu framvið**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Eivør Pálsdóttir og Bill Bourne fóru á pall í St, James Hall í Vancouver, sum vit eisini nevndu á portalinum í gjár.

Við sær høvdu tey eisini fiól-snillingin Lissa Schneckenburger.

Sædis Eilifsdóttir er mamma Eivør, og vit frætta frá henni, at konsertin gekk sera væl og at fleiri føroyingar løgdu leiðina framvið fyri at hoyra Eivør og Bill og fiól-snillingin.

Sunnudagin spæla tey í Hugh's Room í Toronto.

# Sir Tom Jones

**Tom Jones kann nú kalla seg Sir Tom Jones**

Sangarin, entertainarin og av mongum hildin at vera heimsins tekkiligasti abbi. Tom Jones hevur hildið seg á tindunum innan tónleik í fleiri ár og Bretska drotningin Elizabeth hevur nú sligið Tom Jones til riddara fyri at heiðra hansara yrkisleið sum sangari í 41 ár. Sostatt kann Tom Jones nú kalla seg Sir og eisini vænta, at onnur gera tað.